# SMÍL TÚ ERT

**INTERNET** Í morgin, 8. februar, verður Tryggari Internetdagur. Dagurin verður hildin í 65 londum kring heimin, og er hetta aðru ferð, at hann verður hildin í Føroyum. Endamálið við degnum er á ymiskan hátt at varpa ljós á tryggari internetnýtslu við serligum denti á internetnýtsluna hjá børnum og ungum.



Ingunn Eiriksdóttir
stjóri í Dátueftirlitinum

Eins og í londunum rundan um okkum nýta føroysk børn og ung fleiri tímar í talgilda heiminum. Hetta kann vera bæði gott og minni gott alt eftir, hvat tey gera, tá tey eru á netinum. Samstundis setir hetta stór krøv til okkum foreldur og onnur, sum varða av okkara ungu, at stuðla og hjálpa teimum, so tey kunnu ferðast tryggari á internetinum.

Vit skulu nú læra børn og ung góðan fólkaskikk á netinum. Eins og vit sum foreldur hava uppalt tey til at bera seg at í veruliga lívinum, skulu vit nú uppala tey til at taka ímóti avbjóðingunum í talgilda heiminum. Tað snýr seg serliga um hugburð og um at vera ansin.

## Føroysk kanning

Ein kanning, sum Dátueftirlitið gjørdi í fjør av internetnýsluni hjá føroyskum skúlanæmingum vísir, at talið av børnum og ungum, sum nýta sosial netverk á internetinum, er stórt.

Sambært kanningini eru 78% av næmingunum á internetinum hvønn dag ella næstan hvønn dag, og kanningin vísti eisini, at heili 90% av næmingunum hava eina vangamynd á internetinum. Longu tá næmingarnir ganga í 3. flokki, eru teir rættiliga virknir á internetinum, og sambært kanningini hava 72% av næmingunum í 3. flokki eina vangamynd á netinum. Hetta gevur ábendingar um, at væl yngri børn eisini brúka netið.

Tað, at talið av børnum og ungum í Føroyum, sum hava eina vangamynd á netinum, er so stórt, og at tey eru so ung, tá tey byrja, ger, at tað hevur stóran týdning, at tey verða kunnað um, hvørjar skrivaðar og óskrivaðar reglur eru galdandi fyri sosiala lívið á netinum. Hetta setir krøv til bæði foreldur og skúlar at læra tey ungu, hvussu stóran týdning tað hevur at verja sínar upplýsingar á netinum, og hvørjar reglur eru galdandi fyri handfaring av upplýsingum og myndum um onnur.

## Happing

Dátueftirlitið er javnan í sambandi við foreldur, sum kæra sína neyð, tí børnini verða útspilt, happað, víst fram o.s.v. á netinum eins og skúlar í stóran mun venda sær til Dátueftirlitið, tí trupulleikar eru hesum viðvíkjandi. Trupulleikarnir, sum skúlarnir vanliga vísa á, eru bæði næmingar, sum verða happaðir, í onkrum føri so illa, at teir vilja ikki í skúla, men tað kunnu eisini vera lærarar, sum kenna seg illa viðfarnar á netinum av næmingum. Vit síggja fleiri dømir um lærarar, sum verða filmaðir, meðan teir undirvísa, og filmsklipp ella myndir verða síðani løgd á YouTube ella líknandi síður. Ofta kann filmsklippið hava verið har leingi, áðrenn lærarin varnast hetta. Vit kenna eisini dømir um "hatisíður", sum næmingar hava gjørt um føroyskar lærarar.

Fleiri skúlar gera eitt gott arbeiði á hesum øki og raðfesta fyribyrging á økinum, eins og fleiri teirra hava heitt á Dátueftirlitið um at hava framløgur bæði fyri næmingum, lærarum og eisini foreldrum á felags foreldrafundi. Hinvegin eru eisini skúlar, sum kundu gjørt meira við at fyribyrgja óhepnum hendingum á hesum øki. Eins og reglur og mannagongdir eru fyri ymiskum øðrum í skúlatíð, metir Dátueftirlitið, at reglur og mannagongdir eisini eiga at vera fyri nýtslu av fartelefon og interneti, og næmingar eiga at verða kunnaðir um avleiðingarnar av at bróta hesar reglur. Hetta eigur at hava eina fyribyrgjandi ávirkan í sjálvum sær.

Dagurin í dag Tryggari Internetdagur, er eitt gylt høvi at taka evnið upp heima við hús. Lær børnini um persónsvernd. Tosa við tey um, at tey hava ábyrgdina av tí, tey hava lagt út á internetið, eins og blaðstjórar hava ábyrgdina av tí, sum verður skrivað í bløðunum. Tað hevur stóran týdning, at tey hugsa seg væl um, hvørja ferð tey skriva um seg sjálvi ella onnur í kjatti, bloggum, heimasíðum og øðrum á netinum. Sama er galdandi fyri myndir. Tað er altíð ein góður skikkur at fáa samtykki frá tí, sum er á myndini, áðrenn hon verður løgd á netið. Ofta er hetta eisini eitt lógarkrav.

Dátueftirlitið verður á Torginum í SMS allan dagin, og skipað verður fyri ymiskum tiltøkum. Øll eru vælkomin.

## Minst til:

- At halda loyniorðið loynt
- At logga av, tá tú fert frá telduni og set ikki telduna til at minnast títt brúkaranavn og loyniorð
- At verja títt privatlív
- At brúka trygdarásetingarnar, so tú kanst gera av, hvør sær upplýsingar um teg

## Strika meg

**Dátueftirlitið fær javnan áheitanir frá fólki, sum biðja um hjálp til at fáa myndir, filmsklipp ella aðrar upplýsingar, sum liggja á internetinum, strikaðar. Tað snýr seg bæði um upplýsingar á Facebook, YouTube, datingsíðum v.m. og talan kann bæði verða um upplýsingar, sum fólk sjálvi hava lagt út, men sum tey ikki ynskja skulu vera á netinum nøkur ár seinni, men tað kann eisini vera talan um upplýsingar, sum onnur hava lagt út.**

**Fyrr varð sagt, at tað var nærum ógjørligt at strika upplýsingar av netinum, tí upplýsingar spjaðast skjótt við avritan o.t., men tað eru tó ymisk amboð, sum kunnu nýtast, tá óynsktar upplýsingar, myndir v.m. skulu strikast av netinum. Fólk frá Dátueftirlitinum hava fyri stuttum verið í Noregi fyri at læra at brúka hesi amboð og Dátueftirlitið kann nú betur hjálpa fólki, sum vilja hava upplýsingar strikaðar.**